Á Tv3 sunnukvøldið kl. 20.00



Kay (Tommy Lee Jones) og Jay (Will Smith) stríðast ímóti óndum rúmdarverum

# Men in Black II

Í kvøld verður høvi at síggja skemtifilmin Men in Black á Tv3, meðan Men in Black II kemur sunnukvøldið á somu rás. Høvuðspersónarnir í báðum filmunum eru teir báðir Tommy Lee Jones og Will Smith. Rúmdarverur brúka Jørðina sum eitt slag av flóttafólkalegu. Fá menniskju er greið yvir hetta. Einans nøkur heilt fá vita av hesum, og tey eru starvsfólk í tí loyniligu fyri-tøkuni, MiB (Men in Black). Fyritøkan arbeiðir við at veita teimum fremmandu rúmdarverunum tænastur og samstundis verja okkara gongustjørnu, tí summar rúmdarverur ganga við svikaráðum. Jay og Kay stríðast ímóti teimum óndu rúmdarverunum. Teir báðir eru sera ymiskir, men megna tó at arbeiða saman. Í Men in Black II hevur tann eldri Kay lagt starvið sum rúmdarveiðumaður afturum seg og hevur í staðin fingið sær eitt meiri friðarligari starv á einum posthúsið langt burturi frá býum og meginlandinum. Afturat hevur hann fingið strikað minnið sítt, soleiðis at hann nú einki veit um MiB og rúmdarverur á jørðini. Men, ímeðan hevur Jay úr at gera við at stríðist ímóti óndum rúmdarverum. Jay kemur á ræðuliga monstrið Serleena, sum er íklætt eini eiggiligari model. Serleena tekur ræðið á miðstøðini hjá fyritøkuni Men in Black og tekur somuleiðis øll starvsfókini til fanga. Jay hevur nú av álvara brúk fyri Kay - teir báðir eru teir einastu, ið eru førir fyri at bjarga Jørðini.



*Monstrið Serleena (Lara Flynn Boyle) tekur ræðið á borgini hjá MiB og hóttir allan heimin*

Sci-fi/skemtifilmur frá 2002, við: Tommy Lee Jones (Agent Kay), Will Smith (Agent Jay), Rosario Dawson (Laura Vasquez), Lara Flynn Boyle (Serleena), Rip Torn (Zed), Johnny Knoxville (Scrad/ Charlie), David Cross (Newton) o.fl..

Filmslongd: 85 min

Leikstjórnað: Barry Sonnenfield

# Heimsins besti jólamaður

Skemtifilmur frá 2000 við: Leslie Nielsen (Jólamaðurin) Steven Eckholdt (Peter Albright), Robyn Lively (Claire Dreyer), Max Morrow (Zack Dreyer) o.fl..

Upprunaheiti: Santa Who?

Leikstjórnað: William Dear

Á TvDanmark leygarkvøldið kl. 19.55



*Leslie Nielsen er jólamaður í hesum skemtifilminum*



*Jólamaðurin hevur minnisloysi og jólini eru í vanda!*

Tíðindamaðurin Peter Albright er í stórum trupulleikum hvørji einastu jól. Hann hevur nevniliga jólaangist. Men nú knappliga stendur hann beint framman fyri ársins sensatión - ein eldri hyldligur harri við stórum hvítum skeggi dettur úr eini flúgvandi sletu og verður liggjandi uttan vit framman fyri honum. Maðurin við hvíta skegginum hevur fingið minnisloysi, og tað góða menniskjað, sum Peter er, hjálpir honum. Peter fær honum eitt arbeiði í eini handilsmiðstaði, ið júst hevur brúk fyri einum hyldligum eldri harra við stórum hvítum skeggi, ið kann standa og rópa "hó, hó, hó!" Samstundis á Norðurpólinum er ein lítil leikusmiðja, ið manglar leiðslu. Jólini eru í vanda! Men lukkutíð hevur lítli Zack fingið eyga á hvør hesin eldri harrin í handilsmiðstøðini í veruleikanum er.